# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Samhaldsfasti

Eftir sendingina í sjónvarpinum um pensjónviðurskiftini hjá føroyskum pensionistum og eftir alt tað, sum hevur verið sagt og skrivað um hetta mál í fjølmiðlunum í summar, kann eingin vera í iva um, at støðan er alt annað enn haldgóð. Tað eru sjálvandi teir pensionistar, sum bert hava fólkapensjón og Samhaldsfasta at liva, sum er verst fyri. Tað er opinlýst, at hesi fólk ikki hava til dagin og vegin, um tey ikki eru so heppin at hava eina stóra uppsparing. Men hvør kann hinvegin spara stórvegis upp av eini arbeiðsmannaløn ella av eini hýru frá tí lakara endanum av fiskiflotanum? Hetta er alt annað enn gott, og henda støða kann ikki halda fram uttan, at nakað munagott verður gjørt.

Tað er upplagt, at eyguni verða vend móti Samhaldsfasta, og atfinningarnar til útgjaldið gerast fleiri og fleiri. Tað er eisini átaluvert, at tað eftir so mong ár bert kunnu fáas 2230 kr um mánaðin úr hesum grunni. Her er jú talan um pening, sum pensjonisturin sjálvur hevur goldið inn, samstundis sum inngjaldið er vorðið ásett við lóg. Hinvegin hevur lóggávuvaldið onki at siga, tá tað kemur til spurningin um útgjaldið. Henda avgerð liggur hjá stýrinum fyri grunnin. Stýrið hevur eftir øllum at døma sett sær fyri heldur at spara upp enn at gjalda út, tí grunnurin skal upp á eitt ávíst støði, áðrenn hann av álvara fer at virka. Hetta kann tykjast skilagott, men hetta kenst ikki sørt óræettvíst hjá teimum, sum í áravís hava goldið í grunnin, men sum nú bert fáa hesar skallutu 2230 kr, sum illa nokk gera mun við teimum príshækkingum, sum samfelagnum nú er fyri.

Í mong ár hevur verið talað aftur og fram um ein føroyskan pensjónsreform. Hesi seinastu tjúgu árini eru Føroyar so líðandi uttan at myndugleikarnir hava gjørt sær víðari far um tað, vorðnar norðurlendskur eftirbátur á pensjónsøkinum. Her má verið koma í. Tað er í hesum høpi vert at geva gætur, at Sjálvstýrisflokkurin hevur tikið málið upp um norðurlendska sáttmálan um almannatrygd við atliti at Samhaldsfasta. Flokkurin hevur áður reist málið á tingi, sum áður hevur ynskt, at tað verður kannað, um tað er í samsvar við norðurlendska sáttmalan, at landsmenn, sum flyta av landinum missa útgjaldið úr Samhaldsfasta. Hetta kenst sera óræettvíst og tí kemur uppskotið hjá Sjálvstýrisflokkinum í tøkum tíma. Uttan mun til, hvør niðurstøðan er av eini slíkari kanning verður, eigur skipanin at verða broytt, so føroyingar fáa samhaldsfasta útgjaldið við sær, uttan mun til, hvar teir sum pensjonistar seta búgv. Pensjonistarnir eiga jú hendan pening, og tað tykist mongum marghættligt, at einki politikst verður gjørt við hesa óræettvísu skipan. Sjálvstýrisflokkurin hevur nú fingið politiska ávirkan og tí skuldu útlitini fyri eini loysn verið góð. Flokkurin átti samstundis at nýtt høvið til at tikið stig til eitt økt útgjaldið úr Samhaldsfasta. Hetta mál kann ikki í tað óendaliga vera verðandi eitt mál, sum stýrið einsamalt avger, meðan tey sum eiga grunnin sita við kaldar steinar.

**Sosialurin**

## Bíblian innblást av Gudi - ikki mannaorð um Gud

RICHARD DANIELSEN



**36. partur**

**Nýggja Testamenti**

Eg skrivaði í seinasta greinastubba um gamla testamenti, at eg ikki hevði nevnt so nógv um profetiini um Messias. Tað var ikki, tí at eg haldi tey hava lítlan týdning. Nei tey hava allstóran týdning, og nú vit fara undir nýggja testamentið, skulu vit hugsa eitt sindur um hetta. Profetiini um Messias, sum koma skuldi, ganga jú, sum reyður tráður gjøgnum alt gamla testamentið. Í Lukasar evangelii tjugunda fjórða kapitli, lesa vit um, at Jesus, eftir at hann varð upprisin, fylgdist við tveimum lærisveinum, sum vórðu á veg frá Jerúsalem til Emmaus. Har sigur han m.a. hetta:

Tá segði Hann við teir: "Tit lítið hugsandi og trekhjartaðu at trúgva øllum tí, ið profetarnir hava talað! Átti Kristus ikki at líða hetta og so fara inn til dýrd Sína!"

Hann byrjaði nú frá Mósesi og frá øllum profetunum og útlegði fyri teimum tað, sum í øllum skriftunum var sagt um Hann.

Eg hugsi mær til, at nakað av tí hann hevur talað um og víst teimum á, er um tá ið Gud segði við ormin: "Avkom kvinnunar skal sorða høvdið á tær." 1. mós. 3, 15. Ella hetta:

Eg skal signa tey, ið signa teg, og tann, ið tær bannar, honum skal Eg banna; og í tær skulu allar ættir á jørðini verða signaðar. 1.mós.12,3.

Á hann hevur tosað um mangt og hvat. Nóa ørk, Jósef, sum er ein góð mynd av Kristusi. Og ikki at gloyma ofringarnar undir móselóg, sum jú peika fram til Kristus. Óiva hevur hann tosað við teir um ta ferðina, ið Móses slerdi tvær ferðir á klettin og forbreyt seg so stórliga. Henda hending, sum hendi har í oyðimørkini so langt frammanundan, er vissuliga ein mynd av Kristusi, sum bara skuldi verða sligin einaferð fyri okkum, og alt síðani hevur tað verið nokk at tala við hann. Jú bíblian talar um Messias, Kristus allan vegin ígjøgnum. Hann hevur mint teir á koparormin í oyðimørkini, Rahab og tann reyða tráðin.

Hann man hava nomið við sálmarnar 22 og 69 og aðrar, har Dávid profeterar um Kristus. Hann hevur tosað við teir um jomfrúnna, sum skuldi føða Kristus. Es.7. Um hin líðandi Messias í kap 53. Helst hevur hann eisini citerað hetta versið frá Esaiasi.

Tí Barn er føtt okkum, Sonur er givin okkum, og á øksl Hansara skal harraveldið hvíla; Hann eitur Undurfullur, Ráðgevari, Veldigur Gud, Ævigur Faðir, Friðarhøvdingi. Es. 9,6.

Hann er farin gjøgnum Jeremias, Ezekiel og allar hinar. Hann hevur helst talað við teir, um tá ið Dániel sá sjónirnar, har vit m. a. síggja ein, sum kom á skíggjum himmalsins, og hin gamla, sum settist í stólin – Kristus og Gud, flættaðir saman gjøgnum alla skriftina, og kunnu ikki skiljast sundur. Tað eru tey, sum vilja seta Kristus eitt stig lægri, enn Gud, men tað er ikki tað, sum skriftin lærir, teir eru sjóðaðir saman gjøgnum alla skriftina, faðirin og sonurin, tú kanst ikki geva øðrum meiri heiður enn hinum.

Man hann ikki hava lisið hetta versið úr Mika fyri teimum: Men tú Betlehem, Efrata, sum so lítið hevur at týða til at vera millum túsund Juda! Úr tær skal ein ganga Mær út, sum skal vera høvdingi Ísraels. Uppruni Hansara er úr forðum, frá fortíðardøgum.

Hann hevur, ikki minst, verið í Zachariasar bók og hevur talað um, tá ið hann skal koma niður á jørðina at frelsa fólk sítt Ísrael, og føtur hansara skulu standa á oljufjallinum, sum skal klovna. Hann hevur til seinast mint teir á tað, sum Malakias sigur um Hann og undangongumann hansara Elias, sum her er tann sami, sum Jóhannes doypari.

**Framhald**

## Er ósemja um kommunusamanlegging

FINNLEIF GUTTESEN
Suðuroy



**- ella valdar tað bert avgerðarloysið í landsstýrið og løgtingið**

Løgmaður hevði eitt skilagott hugskot í sínari ólavsøkurøðu, og tað var at leggja kommunur saman í seinasta lagi 1. januar 2010.

Nú er síðsta útkall at leggja fram lógaruppskot um kommunusamanleggingina áðrenn kommunuvalið, so at tey, sum bjóða seg fram kunnu vísa, hvat tey vilja arbeiða fyri, tá kommunur eru lagdar saman

Undanførslan um, at tað skal vera sjálvboðið, er bert at leypa yvir, har garðurin er lægstur, tí verandi samanleggingar hava víst, at framburður er í kjalarvørrinum av samanleggingum.

Landsstýriskvinnan og løgtingslimir mugu taka seg um reiggj og fáa hetta avgreitt, ongantíð ov skjótt. Tit hava einki at óttast, tí ein stórur meiriluti av tykkara veljarum hava sæð veruleikan í eyguni og taka undir við samanlegging.

Tað er altíð onkur sum rópar ímóti, men hesi hava ov stuttan sjónarring, tey síggja ikki fram um egnu nøs, tey hjúkla bert um egnu áhugamál og hugsa ikki um heildina.

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Tróndur Skaalum trondur@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Dorit Hansen dorit@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.